QUALITY INNOVATION RELIABILITY





Bakkafrost samtakið framleiðir laks og liðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum umframt kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES.
Tað starvast umleið 200 fólk í samtakinum.

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir roknskaparleiðara til Bakkafrost.

Viðkomandi, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving.

Áhugaði biðjast senda skrivliga umsókn saman við prógvi til:

regin@bakkafrost.com

**Starvsstaður:** á Glyvrum.

**Umsóknarfreist:** 27/09

Um fyrispurningar eru viðvíkjandi starvinum, so kunnu tygum tosa við Regin Jacobsen, stjóra, tel 23 50 01
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Umsóknarfreist:
27. Sept 2008

Bakkavegur 8
FO-625 Glyvrar
Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com
www.bakkafrost.com

BAKKA FROST



FAROE LAW

# Advokatfulltrúi til Faroe Law

Advokatpartafelagið Faroe Law bjóðar advokatfulltrúa starv við nógvum spennandi, áhugaverdum og skiftandi avbjóðingum, serliga á vinnuliga økinum, í einum altjóða umhvørvi. Vit eru partur av einum altjóða skipaðum samstarvi við skrivstovum í Keypmannahavn, Nuuk og Moskva.
Møguleiki er tí eisini at fáa arbeiðsroyndir á hesum skrivstovum.

Vit leggja dent á, at tú raðfestur høgt at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Eyðfinnur Jacobsen, advokat, fartelefon 219902, teldupost eyj@faroe-law.fo, ella Jens Wang, advokat, fartelefon 219903, teldupost jwa@faroe-law.fo.

Skrivligar umsóknir skulu sendast til Faroe Law, postboks 158, 110 Tórshavn og vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. september 2008.

Advokatpartafelagið Faroe Law er ein føroysk altjóða fyritøka. Vit eru nýhugsandi og ikki bangin fyri at koma við nýskapandi uppskotum til eina loysn. Okkara eyðkenni er, at vit hava eina praktiska og vinnuliga tilgongd, tá ið vit arbeiða fyri kundar okkara.

Tróndargøta 19 · Postboks 158 · FO-110 Tórshavn · Tel +298 35 99 00 · Fax +298 35 99 01
faroe-law@faroe-law.fo · www.faroe-law.fo

Damfar

Postboks 154 · FO-110 Tórshavn
Tel: 359977 · Fax: 359980
damfardamfar.fo · www.damfar.fo

# BILFØRARI SØKIST

Vit sóknast eftir førara við stórum koyrikortið og sum eisini hevur áhuga í at arbeiða á goymsluni tá tørvur er á tí.

Fyrimunur er um tú er vanur at koyra lastbil.

Vanlig arbeiðstíð er mánadag til fríggjadag 8-16, men yvirarbeiði kann koma fyri.

Løn sambært avtalu.

Eru spurningar um starvið, eru tit vælkomin at ringja tlf. 228830 og spyrja eftir Andrass.

Vinarliga send umsókn við viðmælum til:

Damfar
Postboks 154
110 Tórshavn

Damfar

Damfar er heilsølan, har tú fært alt innan góðgæti, keks og annað, ið ger kaffi- ella temunnin eitt sindur søtari og betri. Vit umboða øll tey vælumtóktu merkini í Føroyum so sum Cadbury, Haribo og Burton's, bert fyri at nevna nøkur heilt fá. Harumframt er Fóm ísur ein partur av Damfar í dag, og øll søla og avgreiðsla hjá Fóm ísi er frá skrivstovuni hjá okkum. Okkara starvsfólk eru blíð og dugnalig og hava drúgvar royndir í at gera tað lætt og ómakaleyst at vera viðskiftafólk hjá Damfar. Við okkara serkunnleika innan okkara vørubólkar, eru vit ein vælkendur gestur hjá flest øllum gerandisvøruhandlum, kioskum og líknandi sølustøðum.

STARVSLÝSING

## Handverkarar/arbeiðsmenn til Landsverk

Søkt verður eftir tveimum handverkarum/arbeiðsmonnum til nýggjan arbeiðsbólk á vegadeildini á Landsverki, ið skal taka sær av viðlíkahaldi av brúm og tunlum.

Landsverk er landsvegamyndugleiki, og høvuðsuppgávan hjá vegadeildini er at fyrireika, kravfesta, góðkenna, byggja, viðlíkahalda og reka landsvegirnar, herundir at sýna og umvæla tunlar og brýr. Deildin hevur eisini um hendi vetrarhald, herundir at kanna og fráboða koyrilíkindi, salta fyri hálku og at rudda landsvegirnar fyri kava. Harafturat umsitur vegadeildin ferðslumál og tilbúgving.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá nýggja arbeiðsbólkinum er at fyrireika og fremja eitt skipað viðlíkahald av brúm og tunlum, ið Landsverk varðar av. Fasta møtistaðið er á verkstaðnum í Kollafirði, men arbeitt verður um alt landið, so ferðing er partur av arbeiðinum. Stundum kann eisini roknast við longum døgum og nakað av náttararbeiði.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir handverkarum/arbeiðsmonnum við útbúgving og/ella royndum í tunnils-, brúgva- og betongarbeiði. Røttu persónarnir við áhuga fyri nevnda virkisøki fáa møguleikan at menna seg í yrkinum við viðkomandi upplæring.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn
lv@lv.fo

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22. september 2008. Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sigurd Lamhauge, tel. 540 889, sila@lv.fo, ella til Mikkel Heide Frandsen, tel. 540 882, mhf@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herímillum tyrlupallar.*